**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Kanningar av makreleggum - Túrur nr. 1622**
**Tíðarskeið 25/5 - 5/6 2016**

---

**Fólk frá Havstovuni:** Helga Bára Mohr Vang, Mourits Mohr Joensen og Poul Vestergaard

**Ábyrgd:** Jan Arge Jacobsen

**Endamál:** At kanna útbreiðslu og nøgd av makreleggum í havøkjum sunnan fyri Føroyar. Kanningin er skipað sum ein felagskanning yvir 8 tíðarskeið (frá januar til august) í gýtingarøkinum hjá makreli, tvs. frá Portugal til okkara leiðir. Londini, sum luttaka í kanningini, eru Føroyar, Ísland, Danmark, Týskland, Holland, Írland, Skotland, Portugal, Ongland og Spania.

**Reiðskapur:** Flótitrol við boyum/fendarum til at tóva í vatnskorpuni

**Útgerð:** Seabird CTD við rosettu, Bongo glúp við 280µ meskavídd. Dýpdarmátara.

**Um túrin:** Túrurin gekk væl. Makrelegg vóru funnin í øllum økinum, í 82 støðum av 85, og útbreiðslan var væl víðari enn roknað var við. Serliga var útbreiðslan vestan fyri óvæntað.
Vit fóru av Havnini tann 26/5 kl. 12. Byrjað var eystan fyri Nólsoynna við at kalibrera streymmátararnar. Síðani var hildið fram á fyrstu støðina, sum 61°15'N og 4°15'V. Vit arbeiddu okkum vestureftir men høvdu trupulleikar við dýpdarmátarunum, tvs. vit fingu ikki samband við dýpdarmátaran á bongo-ini. Av tí at dýpið er ein týðandi partur, tá ið nøgdin av makreleggum verður útroknað, og fleiri støðir vóru á grunnum dýpi, mettu skipari og túrleiðari, at skilagott var at sigla inn til Tórshavnar at fáa dýpdarmátararnar kannaðar. Vit vóru tí aftur á Havnini tann 27/5 kl. 12, har ið starvsfólk frá Marport kom umborð, og vit fingu eyka mátarar. Vit fóru av Havnini aftur kl. 14 og hildu fram á fyrstu støðini vestan fyri Føroyar á 61°45'N og 7°45'V.
Dýpdarmátarin riggaði væl nú, og arbeiðið gekk skjótt vestureftir, og vit vendu suður á ta næstu kanningarlinjuna seinnapart leygardag. Á eystara enda á tí linjuni koyrdu vit flótitrolið út. Meðan vit tóvaðu, vóru sera nógvir grindahvalir nær við trolið, og valdu vit tí at hála, tá ið trolið hevði verið úti í hálvan tíma. Umleið eitt tons av fiski var í, blandað ca. 60% makrelur og 40% sild. Ríkiligt var tí til tann fyrsta prøvan.
Tínæst sigldu vit suður á 58°45'N og 6°15'V og byrjaðu á sunnastu kanningarlinjuni; hetta fyri at fylgja kanningarætlanini hjá hinum londunum betri. Veðrið var verandi gott, og arbeiðið gekk væl vestureftir. 2/6 byrjaðu vit á tí fjórðu og síðstu kanningarlinjuni. Har tóku vit tvær støðir, áðrenn vit koyrdu trolið útaftur, fyri at fáa tann næsta prøvan av makrel. Vit tóvaðu í góðar 90 minuttir í góðum líkindum, og har vóru eini 300 kg av reinum makreli í, og nógmikið var av búnum rognafiskum til kanningar. Av tí sama var tað tann síðsta trolstøðin. Siglingin eystureftir gekk væl, tó nakað seinni enn higartil, av tí at vindurin var vaksin, og tað rak ímóti. Vit tóku síðstu støðina tíðliga á morgni 5/6 og vóru á Havnini kl 22 sama kvøld.
Allir bongoprøvanir blivu sorteraðir, egg frá æti, við skúming umborð, og eggini blivu tald til fyribils úrslit, sí Mynd 1.
Føroyska kanningarøkið sambært ætlanini, sí Mynd 2, bleiv alt kannað, og afturat blivu lagdar støðir eystanfyri og støðir í kantinum á útbreiðsluøkinum, har prøvarnir vístu seg at innihalda stórar nøgdir av makreleggum.

**Prøvataking:** Tiknar vóru 85 støðir við CTDini, og 85 prøvar við Bongo, umframt 2 hál við flótitrolinum.

**Nær eru prøvarnir arbeiddir upp:** Makrelegg-prøvarnir verða arbeiddir upp áðrenn 8. juli og nytrurnar verða lisnar skjótast til ber.

**Viðmerkingar:** Nakrir av manningini royndu eftir makreli við tráðu, og var hann javnan at fáa á allari siglingarleiðini. CTDin riggaði væl tað mesta av tíðini, tó vóru eitt sindur av trupulleikum við sambandinum, serliga í seinnu helvt á túrinum.




**Mynd 1:** Fyribils úrslit av egg teljingum frá kanningunum á túri 1622.




**Mynd 2:** Økið, sum ymisku londini skuldu kanna í 6. tíðarskeiði (30/5-20/6). Magnus Heinason skuldi kanna reyðgula økið.